DAGSINS MEINING

Hví er Margrethe drotning ikki við?

Tað var ein stórfingin dagur í Føroya søgu á ólavsøku í 1952, tá 100 ára dagurin fyri endurstovnanina av Føroya Løgtingi, hesum mæta og søguliga tingi, varð hátíðarhildin. Millum mongu innbodnu gestirnar var eisini kongur.

Nú vit skriva 2002 eru 150 ár liðin síðani somu endurstovnan og verður dagurin aftur hátíðarhildin. Hesaferð eru løgtingshúsini eisini umbygd til dagin og eru eisini mong umboð úr útlandinum boðin við til hátíðarhaldið.

Tað, sum tó kann undra, er, at Margrethe drotning, hægsta umboðið fyri kongshúsið, er ikki boðin við til hetta megnar hald, nú hon er drotning fyri alt ríkið, tvs. eisini fyri Føroyar.

Tað kundi tí verið sera áhugavert at fingið at vitað, hví ikki hennara hátign Margrethe drotning ikki er boðin við og kann vera hjástødd til hetta stóra hátíðarhald? Er hetta eitt mistak ella hevur tað verið politikkurin hjá undanfarna formanskapi í løgtinginum við vælsignilsi úr Tinganesi, at hægsta umboð fyri kongshúsið ikki skuldi verða boðið við til hátíðarhaldið?

Neyvan man tað vera eitt mistak, tí tað vildi í sær sjálvum verið einki minni enn ein skandala. Kann tað so veruliga passa, at tað hevur verið eitt politiskt ynski, at drotningin ikki varð umboðað til slíkt hátíðarhald? Hóast undanfarna samgonga legði hart út á fullveldiskós í byrjanini av valskeiðnum, so vita vit, at tað dragnaði í kongunum sum leið út móti endanum av valskeiðnum. Og tá hugsað verður um, at eisini Tjóðveldisflokkurin hevur verið heitur talsmaður fyri at varðveita felags kongshús skuldi man trúð, at Margrethe drotning var vælkomin til hetta fyri okkum føroyingar so týðandi hátíðarhald.

Tú nýtist tí hvørki at vera sambandsmaður ella samríkjamaður fyri at vera kongstrúgvur. Tá sjálvt tjóðveldisfólk kunnu góðtaka framhaldandi kongsveldi her á klettunum, og vit vita, at føroyingar flestir eru sera kongstrúgvir, so er tað ein gáta, hví ovasta umboðið fyri sama kongshúsið ikki er boðið við til hetta hátíðarhald.

Spurningur okkara til politiska myndugleikan í Føroyum er tí: hví er Margrethe drotning ikki boðin við til 150 ára dagin fyri endurstovnini av Føroya Løgtingi? Hetta er ikki ein spurningur um samband ella sjálvstýri. Hetta er ein spurningur um virðing og tign.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Nú mugu myndugleikarnir taka annað skinn um bak við suðuroyarsiglingini!

Johan Dahl
Løgtingsmaður fyri Suðuroynna

Bjóða landsstýrismonnum til suðriar ein heyst- ella vetrardag í vánaligum veðri við Smyrli, uttan stabilisatorar – tað hevði kanska fingið latið upp fyri ørvísi stoðutakan, tá tað snýr seg um at váttað pening til einastu farleið okkara við meginøkið - SMYRIL.

Virðingin fyri suðringum og vinnuni í oynni frá landsmyndugleikans síðu er eftir seinastu stoðutakan teirra á einum sera lágum stoði! - teir halda, at vit skulu taka til takkar við tí, sum okkum verður bjóðað óansæð trygd og dygd.

Einhvør sum hevur eitt sindur av skili kann siga sær sjálvum, hvat tað hevur at týða fyri vinnuna, um hon ikki fær flutt sín farm avstað úr oynni, tá hon skal - og skal tað verða soleiðis í heyst og vetur, og kanska út á várið, at skiparin á Smyrli skal hava tað tungu byrðu á sær at avgera, nær møguligt er at flyta farm vegna veður fyri trygdina - tá skulu væntast nógvar avlýsingar vegna trygdina umborð, sum sjálvandi skal setast í hásæti.

Vinnan kemur her at verða fyri einum enn størri bakkasti, enn tá verkfallið rakti somu vinnu so dyggiliga í summar.

Spyrjið tit skipararnar á Smyrli um, hvussu fer at gangast um tit ætla at sigla uttan stabilisatorar í heyst og vetur?

Reiðarin á Strandferðsluni hevur sagt, hvussu fer at verða um ikki annað skip fæst at sigla. Reidar Nónfjall bant um heilan fingur sum rætt var, men hvat fekk hann afturfyri sína professionellu stoðutakan?

Krakk frá landsstýrinum og vinnumálaráðharranum sum feigaðu hansara uppskot til loysn av trupulleikanum av borðinum!

Og tað sama fáa Suðringar - enn einaferð!

Um ikki avvarðandi myndugleikar finna eina sømuliga loysn á hesum fyri allar suðringar og vinnuna í oynni so álvarsligu stoðu, sum siglingin og flutningur til og úr oynni fer at koma í, í nærmastu framtíð, so fara vit at kalla saman til oyggjafund, har stoða verður tikin til, hvat gerast skal í verki fyri at verða hoyrd og vird av landsins myndugleikum!

Vit krevja sama rætt og somu møguleikar sum restin av landinum hvat viðvíkur flutningi av fólki og farmi til og frá meginøkinum.

Boykot israelske varer

Leif Jacobsen

Køb ikke israelske varer og derfor heller ikke israelske ferierejser, så længe Israel fortsat besætter Palæstina.

Israel mangler åbenlyst viljen til en retfærdig og varig fred i Mellemøsten.

I årtier har den israelske statsmagt trodset beslutninger fra verdenssamfundet og FN's generalforsamling om palæstinensernes rettigheder. Især efter Oslo-aftalen i 1993 har Israel styrket sine positioner på bekostning af det palæstinensiske folks rettigheder, blandt andet ved at foretage en voldsom udbygning af de kolonialistiske bosættelser i de besatte områder.

Fred er uforenelig med besættelse af de palæstinensiske selvstyreområder på Vestbredden og i Gaza og med undertrykkelse af palæstinenserne dér. Israels terror, den kollektive afstraffelse af den palæstinensiske civilbefolkning og brugen af likvideringer krænker såvel fol keretten som menneskerettighederne og de internationale regler og må stoppes.

Intifadaen har gjort det klart, at palæstinenserne ikke vil acceptere Israels plan for at lade dem leve som undermennesker i en ikke-levedygtig palæstinensisk stat. De står derimod fast på deres internationale og FN-anerkendte nationale rettigheder. Samtidig med at Israel nægter de palæstinensiske flygtninge at vende tilbage, tager landet imod hundredtusindvis af immigranter fra hele verden og opretter fortsat nye bosættelser i de besatte områder i modstrid med FN's resolutioner . Israel sigter på at knuse det palæstinensiske selvstyre, ødelægge den palæstinensiske økonomi og tage livsgrundlaget fra palæstinenserne.

Israel skal tvinges til at rømme de besatte områder nu!

DERFOR BOYKOT ISRAEL!

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tiðindaleiðari:
Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin

Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Friggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

Morgunstjørnan sandblást innanborðs

Línuskipið Morgunstjørnan stendur fyri eini størri umvæling. Hon verður sandblást innanborðs, og arbeiðið verður gjørt í Føroyum

UMVÆLING
Edvard Joensen

Eiði: Morgunstjørnan verða sandblást innanborðs. Talan er um umvæling fyri eina hálva millión krónur.

Tað ber væl til at gera slíkt arbeiði í Føroyum, hava teir sannað, sum eiga Morgunstjørnuna og Vesturland á Eiði.

– Fyri stuttum varð Vesturland sandblástur innanborðs, og úrslitið er so mikið gott, at vit valdu at sandblása Morgunstjørnuan her heima eisini, sigur Rólant Poulsen, reiðari og skipari á Morgunstjørnuni.

Morgunstjørnan er yvir 40 ára gomul. Hon er fysta stálskipið, sum smíðað er í Føroyum. Tað var á Tórshavnar Skipasmiðju í 1961, og æt skipið tá Porkeningur.

Rólant Poulsen greiðir frá, at teir í gjør gjørdu eina tjykdarkanning av skrokkinum, og vísti tað seg, at har hann var tynstur, var han kortini tjykri, enn tey skipini, í dag verða smíðað, vanliga eru. So hann ivast ikki í, at til ber at hava skipið í drift nøkur ár enn.

– Men nú er tað kortini gamalt, og støða skal takast til, hvat gerast skal, sigur hann og sipar til, at tað alla tíðina verða hugsað um, hvart tað er skilagott at fara undir nýtt, ella umvæla tað góða, gamla skipið.

Teir hava so valt at sandblása Morgunstjørnuna, sigur hann og vísir til at royndirnar við Vesturland hava víst, at tað arbeiðið, gjørt er, er gott.

Tað er virkið hjá Ragnari Poulsen við Ljósá, sum ger arbeiðið, ið verður gjørt við bryggjuna á Eiði.

Rólant Poulsen sigur, at sjálvandi hevur verið hugt at, hvussu tað loysir seg fígjgarliga í mun til at fara uttanlands at gera slíkt arbeiði. Og úrslitið, teir eru komnir til, er, at tá allir snøklar eru tiknir við, er tað fult so bíligt at gera arbeiðið í Føroyum.

Hendan tíðin er eisini tann rætta til slíkt, vísir hann á. Fiskidagarnir eru við at vera uppi, og fleiri virki fara helst at lata aftur vegna summarfrí fyrsta dagin, sigur Rólant Poulsen.

Dekkið á Morgunstjørnuni er ruddað go gjørt klárt til sandbláseing

Mynd: Edvard Joensen

Drive In bingo í Vágum

Vestanstevnutiltøkini tjóvstarta sunnudagin við einum heldur óvanligum bingospæli á flúgvarabedingini. Tá verður fyri fyrstu ferð í Føroyum spælt bingo, meðan sitið verður í bilinum. Eitt sonevnt Drive-In bingo

BINGOSPÆL
Edvard Joensen

Fyrsta Drive In bingospælið í Føroyum verður roynt í Vágum sunnudagin. Tiltakið er liður í Vestanstevnuni, hóast tað liggur eina viku undan sjálvari stevnuni.

Sunnudagin klokkan 15 verður farið at spæla bingo í Vágum. Nú er tað ikki nakað serligt sum so, tí tað verður tað gjørt hvørja viku, upp til fleiri ferðir um vikuna.

Men hetta bingospælið er øðrvísi enn hini, tí spælt verður í bilinum, sum fólk koyra inn á flúgvarabedingina Niðri við Vatn, har tey so sita og fylgja við, hvørji tøl verða drigin.

Stórir hátalarar verða settir upp á økinum, so lætt verður at fylgja við, hvsuu gongur. Og tann, sum so hevur fingið bingo, skal so trýsta á hornið og floyta fyri at gera vart við, at hann hevur vunnið.

Sum undir vanligum bingospæli verða pláturnar seldar á økinum, og alt fer annars fram, soleiðis sum vanligt er í slíkum førum.

Tó verður mint á, at tann, sum ætlar sær at luttaka í hesum spælinum, skal sjálvur hava undirlag til at leggja pláturnar á, og skriviamboð við sær, siga fyrireikararnir.

Er onkur, sum ætlar sær til hetta forkunnuga tiltakið, men ikki hevur bil, ber til at ringaja á tlf. nr. 22 34 17, og verður ein so heintaður við bussi, sum koyrir fólk á staðið. Tað ber so til at sita í bussinum, meðan spælt verður. Og koyrt verður heim aftur, tá liðugt er.

Føroya fyrsta Drive-In bingo verður sunnudagin á flúgvarabedingini við Leitisvatn
Mynd: Edvard Joensen